## Nýggj føroysk met í Melbourne

Føroysku svimjararnir í Melbourne hava fingið enn fleiri góð úrslit í nátt. Jutta Thomsen og Mona Simonsen tóku lut í 200 m frí hjá kvinnum í nátt, og tær vunnu báðar sín riðil. Jutta Simonsen megnaði eisini at seta nýtt føroyskt met við tíðini 2.10.81. Hetta gav 66. pláss av 104 luttakarum, og í sínum aldursbólki er hon millum tíggju tey sterkastu. Pál Joensen var eisini í hylinum í nátt, tá hann svam 800 m frí. Hann kom á mál í tíðini 8.30.31, og hetta gav honum eitt 34. pláss av 46 svimjarum. Hann setti eisini nýtt føroyskt met á hesum teini. Stóra sjónvarpsrásin Eurosport hevði hesa viðmerking um føroysku svimjararnar í nátt. – All together Faroe Islands are doing very, very well.



## Michael Phelps setti nýtt heimsmet

Fleiri av heimsins bestu svimjarum taka eisini lut í HM-kappingini í Melbourne, og ein teirra er amerikumaðurin, Michael Phelps. Í nátt megnaði hann at seta nýtt heimsmet á teininum 200 m frí. Hann kom á mál í tíðini 1.43,86, og sostatt tók hann 0,20 sekund av gamla metinum hjá avtraliumanninum, Ian Thorpe.

# Tem trívist væl á liðnum

**Nýggi føroyski landsliðsleikarin, Tem Hansen, trívist væl á liðnum, hóast hann ikki fekk langa tíð at umráða seg, tá honum varð bjóðað pláss á liðnum. – Teir høvdu fingið eitt avboð og ringdu til mín. Eg var áhugaður og fleyg við til Spania dagin eftir, greiðir Tem Hansen frá, sum ikki dylur yvir, at hann var bilsin um at verða úttikin**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Tað var deiligt at spæla mín fyrsta dyst fyri landsliðið, sigur nýggjasti maðurin í hópinum, 23 ára gamli Tem Hansen, hvørt omma í faðirætt er føroysk*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tbilisi, Georgia:** Tem Hansen er 23 ára gamal. Hann býr í Danmark og spælir á miðvøllinum hjá Fremad Amager. Navnið ljóðar ikki serliga føroyskt, men brádliga stóð Tem Hansen millum nøvnini av leikarum, sum skuldu við til árligu venjingarleguna á la Manga í Spania.

– Teir høvdu fingið eitt avboð og vistu, at eg kundi spæla fyri Føroyar. So teir ringdu og spurdu um eg var áhugaður at koma við. Tað vildi eg fegin, so tað var tað, greiðir nýggjasti føroyski landsliðsleikarin frá.

### Gjørdist bilsin

Í eitt ár hevur Tem Hansen vitað, at hann kann umboða Føroyar. Kortini gjørdist hann bilsin, tá hann fekk landsliðsboð.

– Ja faktiskt var eg bilsin. Eitt ár frammanundan gjørdist eg greiður um, at eg kundi spæla við Føroyum, men eg hevði ongantíð hoyrt nakað frá teimum (Fótbóltssambandinum, blðm.), og roknaði ikki við nøkrum. So tað var bara stuttligt, tá boðini komu, heldur Tem Hansen.

### Deiligt at fáa debut

Hann var við á venjingarleguni í Spania, er við nú og sostatt er hetta onnur ferðin, at Tem Hansen er við landsliðnum.

– Eg haldi tað hevur verið gott. Vit høvdu ein sera góðan túr til Spania. Tað var ein frálíkur máti hjá mær at læra alt at kenna kring landsliðið, ikki minst leikararnar.

Í la Manga spældi landsliðið fleiri venjingardystir, har Tem Hansen var við. Hesir dystir vóru tó ikki altjóða skrásettir. Men tað var dysturin leygardagin, tá Tem Hansen kom inn fyri Súna Olsen, tá ein lítil hálvur tími var eftir at spæla móti Ukreina.

– Tað var deiligt at spæla sín fyrsta dyst, tað var tað! Eisini sjálvt um vøllurin ikki var so góður. Eg haldi dysturin var so rímiligur. Vit stóðu væl í verjupartinum, og forðaðu teimum í at fáa nakrar stórar møguleikar, sigur Tem Hansen, sum nú bara gleðir seg til dystin í annaðkvøld.

# Biðja um rok

**VÍF-spælarin, Ingi Olsen, heldur, at dómaraásetingarnar til mansfinalurnar eru sera óhepnar. – Eg haldi, at dómarafelagið biður um rok við at seta pør, sum hava tilknýtið til Kyndil, at døma allar finalurnar**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Ingi Olsen er ein av spælarunum, sum hevur verið við at myndað besta liðið hjá VÍF í nógv ár. Sjálvt um hann ikki var á vøllinum sunnudagin orsaka av einum skaða, so var hann partur av VÍF-liðnum.

Sum nógvir aðrir vestmenningar, so heldur hann eisini, at dómaraásetingarnar eru rættiliga óhepnar. Vita hava eitt altjóða par, men velja nærum ikki at nýta tað til finalurnar.

- Man má undrast á, at uttanveltaðir dómarar ikki døma finaluna. Eg haldi, at dómarafelagið biður um rok, tá man setir tvey pør, sum hava tilknýtið til Kyndil, at døma allar tríggjar finaludystirnar, tá hetta kann umgangast, ella at dómarafelagið ikki velur at nýta altjóða dómaraparið meira.

### Útlendskt dómarapar

Eftir fyrsta finaludystin millum Kyndil og VÍF hevði venjarin hjá Kyndli, Jónleif Sólsker, at harða og kontanta verjuspælinum hjá VÍF, og hetta skilir Ingi einki av. Fyri honum er tað sum at kasta við steinum, tá man sjálvur býr í einum glashúsi.

- Eg haldi tað vera keðiligt, at venjarin hjá Kyndli fær tað at ljóða so, tí hetta er also ikki heilt rætt. Lars hevur ikki givið okkum nøkur sum helst boð um at fara á vøllin við tí fyri eyga at verja ljótt.

Ingi heldur annars, at tað hevði verið eitt avbera gott hugskot at fingið eitt dómarapar úr øðrum landi heim at dømt seinnu finaluna.

- Ja, eg haldi, at tað hevði verið eitt avbera gott hugskot við dómarapar úr øðrum landi, tí so kundi man fingið fokus aftur á hondbóltin.

### Spælið var ikki nóg gott

Ingi var sum heild ikki so væl nøgdur við dømingina í fyrsta finaludystinum, men hann sigur, at hetta skal ikki vera ein umbering fyri spælið hjá vestmenningum.

- Nei, hetta skal ikki vera nøkur umbering, tí okkara spæl var ikki nóg gott á degnum. Har er nógv, sum vit skulu bøta um til næsta dystin, men tað skal nokk fara at ganga, sigur Ingi Olsen at enda. Hann væntar eisini sjálvur at vera klárur til dystin í Vestmanna leygardagin.




*- Man má undrast á, at uttanveltaðir dómarar ikki døma finaluna. Eg haldi, at dómarafelagið biður um rok, tá man setir tvey pør, sum hava tilknýtið til Kyndil, at døma allar tríggjar finaludystirnar, sigur Ingi Olsen*